# Bygdasligir og eitt sindur heimføðisligir

**MYTUR UM KLAKSVÍK** Tað eru nógvar mytur um Klaksvíkingar, men nógvar av teimum passa ikki, sigur sálarfrøðingur

Áki Bertholdsen

Ein orsøk til at fólk aftra seg at búsetast í Klakvík er, at Klaksvík er komið í ringt orð.

Tað avdúka samrøður, sum vakstrarbólkurin hjá Klaksvíkar Býráði og Suni Poulsen, sálarfrøðingur, hava havt við ein hóp av fólki.

Tey hava nógvar atfinningar ímóti klaksvíkingum. Hald er í summum atfinningum, men øðrum atfinningum er tað púra onki hald í øðrum, heldur sálarfrøðingurin.

Ein vanlig atfinning er, at tað er alt ov keðiligt í Klaksvík, tí tað er ov lítið at fara til.

Eitt, sum ger Klaksvíkina keðiliga, er, at kafélívið er deydligt, og at matstovurnar og dansistøðini eru ov fá.

- Hetta er bara partvís rætt, tí samanumtikið hendir ikki so lítið í Klaksvík og hvørt ár eru fleiri stór tiltøk.

Og kafélívið heldur hann ikki er nakar trupulleiki, tí er veruliga brúk fyri eini kafé, skal hon nokk koma.

Annars er kafémentanin ikki so stór í Klaksvík, tí fólk ganga inn til hvønn annan at drekka kaffi og skipa fyri føðingardøgum og tiltøkum, har tey bjóða fólki heim.

- Tað er altso ikki rætt, at ein kafé er lykilin til menning, sigur Suni Poulsen.

Ein onnur vanlig atfinning er, at Klaksvíkin er gjøgnumsúrgað av vinaog kenningapolitikki og at tey, sum hoyra til ávísar trúarbólkar, fáa betri sømdir enn onnur.

- Hesum er púra onki hald í. Hetta hevur einaferð verið støðan, men er tað avgjørt ikki longur, staðfestir Suni Poulsen.

Og so eru tað ikki so fá sum halda, at gjaldið fyri at koyra ígjøgnum Norðoyatunnilin, er ein forðing fyri menning.

Men her er sálarfrøðingurin bara samdur. Hann er samdur í, at ókeypis koyring hevði ført til meiri ferðslu, men tað er ikki nóg mikið til at skapa vøkstur í Klaksvík og tað er heldur ikki ein avgerðandi forðing.

Yvirhøvur heldur hann ikki, at nakrar av hesum atfinningum hava serliga stóran týdning, tá ið við hugsa um tær veruligu avbjóðingarnar, ið standa fyri framman, heldur sálarfrøðingurin.

### Bygdasligir

Suni Poulsen heldur kortini, at spyrt tú fólk uttaneftir, hvat tey halda um klaksvíkingar, er niðurstøðan rættiliga sermerkt.

- Nógv halda, at klaksvíkingar eru lokalpatriotiskir og bygdasligir eisini eitt sindur heimføðisligir – men at teir enntá eru eitt sindur stoltir av tí.

Klaksvíkingar bera eisini orð fyri at hava ein sterkan felagsskap og tað er ikki lætt hjá fremmandum at sleppa upp í sosiala felagsskapin hjá klaksvíkingum

Men skulu tey eyðmerkja ein klaksvíking, er tað eisini ein sjómaður, sum livir ta frælsa og sunna lívið, ein norðuratlantiskur-cowboy, sum livir í og av náttúruni.



**GOTT STØÐIÐ**

*- Skal vinnulívið fjøltáttast, er ein góður máti at byggja oman á eitt vinnulív, har klaksvíkingar eru dugnaligir frammanundan og her eru teir væl fyri og hava eitt gott støði at byggja á, sigur Suni Poulsen, sálarfrøðingur*

### Selja upplivilsi

Suni Poulsen leggur dent á, at í hesum sambandi er eisini alneyðugt at hugsa um at útvega størv til bæði mannfólk og konuólk.

- Tað nyttar ikki at hava góð størv til mannfólk, tí fær konan ikki eisini starv, taka menninir heldur ikki størvini.

Sálarfrøðingurin heldur, at tí eiga klaksvíngar eisini at leggja dent á at menna upplivingarvinnuna.

Hann heldur, at her eru nógvir møguleikar.

- Tað er ikki serliga viðurkent, men klaksvíkingar eru helst føroyameistarar í at skipa fyri undirhaldi og avbjóðingin er sjálvandi at byggja meiri upp á hesa vinnuna, so at talan ikki bara verður um einstøk tiltøk, sum Summarfestivalurin.

Umframt Summarfestivalin nevnir hann Sjómannadagarnar, Torradagarnar, Trukkarafestivalin, Trøllapætur, umframt eitt ríkt og fjøltáttað tónleika- og listalív yvirhøvur.

- Tað ræðir um at stuðla og stimbra tað umhvørvið, tí eg haldi, at her er av álvara nakað at byggja á, so at tað verður ein verulig vinnuvegur, sigur Suni Poulsen.

Hann leggur afturat, at ein slík menning førir annað við sær, at nú kafélív, matstovur, leikhús og onnur stórbýareyðkenni, sum draga enn meiri fólk við skapandi evnum, til sín.

## Fýra bólkar

Suni Poulsen staðfestir, at ein kanning hjá Norðuratlantsbólkinum vísir, at í høvuðsheitum kunnu føroyingar í Danmark býtast í fýra bólkar.

Har er ein bólkur av føroyingum, sum føla seg sum danir og tey koma aldrin aftur, so tað er bursturspilt at brúka orku upp á at royna at lokka tey heim aftur.

Hinvegin er ein stórur bólkur, sum er farin niður at lesa, tí útbúgvingin fæst ikki í Føroyum, men sum hevur ein sterkan, føroyskan samleika. Men ofta finna tey sær maka og verða sostatt "fangað" í Danmark.

- Tað er púra skeivt at siga, at tað er gott, at ung fara av landinum at lesa, tí so kunnu tey koma aftur við nýggjari vitan, sigur Suni Poulsen.

Tí hevur tað týdning at hava góð útbúgvingartilboð í Føroyum, so at ung fólk sleppa undan at fara av landinum.

- Men so er eisini ein bólkur av føroyingum, sum hava ein tvíbýttan samleika og fáa tey eitt gott starv, kunnu tey lokkast heim aftur.

Og so er tað ein bólkur av føroyingum í Danmark, sum tað ikki er pláss fyri í Føroyum, tí umstøðurnar eru nógv betri í Danmark, tað kann vera stakir uppihaldarar, tónleikarar, listafólk og so víðari.

### Harður kampur

Suni Poulsen staðfestir, at skal tað eydnast at lokka fleiri fólk til Klaksvíkar at búgva, verður tað ein ein harður kampur.

Hann leggur afturat, at hesin kampurin er á tveimum hermótum, tí Klaksvíkin kappast ikki bara ímóti Havnini.

Tað er sanniliga eisini ein kapping ímóti Keypmannahavn, sigur hann

Sostatt er Klaksvík ikki bara ein útjaðari í Føroyum, tí Føroyar eru eisini ein útjaðari í Evropa og tað er støðuna serliga torføra.

Tí er Klaksvíkin tvífaldur útjaðari.

- Nógv ung flyta til Danmarkar at lesa. Men tá ið tey eru liðug og skulu velja sær bústað, skal Klaksvíkin bæði vigast upp ímóti Havnini og ímóti Keypmannahavn.

Heilt nógv velja antin Havnina ella Keypmannahavn og Klaksvíkin stendur eftir sum tapari.

**Tað er einstátta og keðiligt í Klaksvík**

## Víkingabýur í Klaksvík

Sum tað sæst í aðrari grein her á síðunum, heldur Suni Poulsen, at klaksvíkingar eiga at menna upplivilsisvinnur.

Hann hevur enntá okkurt heilt ítøkiligt uppskot um, hvussu tað kann gerast.

- Eg havi altíð droymt um at Klaksvík skal verða ein víkingabýur, sigur hann.

Hann vísir á, at amerikanarar hava Disneyworld og hann kundi væl ímynda sær at ein víkingabý ella ein "Vikingworld" í Klaksvík.

Hann heldur, at onkur avtoftað bygd hevði verið væl hóskandi til endamálið.

Hann er sannførdur um, at hetta hevði verið ein íløga, sum hevði loyst seg, hóast tað hevði kostað nógv at gjørt tað ordiligt, tí hann ivast ikki í, at tað hevði drigið nógv fólk til Klaksvíkar.